# út at koyra

## 50 mió Opel

Tað tók Opel 100 ár at byggja 50 milliónir bilar.

Í hesi 100 árini eru framleiddir 47 milliónir Opel og Vauxhallbilar. Vauxhall er bretska vørumerkið hjá Opel.

Herumframt eru framleiddir 2,2 milliónir opelbilar í Suðuramerika undir navninum Chevrolet, 700.000 eru seldir sum Holden í Avstralia og 100.000 sum Delta í Suðurafrika. Opel nummar 50 millión var ein Omega.

## Nýggjur Mazda 626

Mazda 626 hevur fingið eina andlitsupplyfting. men danski Mazdainnflytarin, Andersen Motors A/S í Køge, hevur framvegis nógvar bilar av gamla sniðnum á goymslu, so nakrir mánaðir verða, til bilurin verður at síggja í Danmark, skrivar Motor hjá FDM. (Hvussu verður í Føroyum er okkum ógreitt, men tað vita vit kanska í næstu útgávu).

Broytingarnar eru smáar, m. a. er innbúgvið tvílitt. 1.8 litur grundmotorurin gevur framyvir 100 hk í staðin fyri 90, samstundis sum dreyningsmomenti økist frá 146 Nm til 152 Nm, men nú við 4000 snúningum heldur enn fyrr við 2500 snúningum.

## Mégane hevur elforrútar

Higartil hava vit bert sæð ein forrút við hitatráðum í Ford-bilunum. Sera gott um veturin, men onkur heldur, at hetta er óheppið tá sólin skínur ella tú fært eitthvørt bjart ljós í eyguni.

Í eini bólkatest av fýra stationcar í blaðnum Motor hjá FDM, m. a. Renault Mégane, legði testliðið ikki tilmerkis, at Renault nú eisini er farið at leggja hitatræðirnar í forrútarnar, so tað fekk hann sjálvandi eitt eyka pluss fyri, eins og hiti í forsetrunum er standard.

Mégane hevur sum einasti Renault 12 ára trygd móti gjøgnumtering og ikki átta ár, sum hinir Renaultbilarnir

**Kelda: FDM Motor**




*Toyota Corolla frá Reyni Service*

## Andlitsviðgjørdur Toyota Corolla

Toyota er komið á marknaðin við einum bøttum Corolla. Tað fyrsta, vit leggja til merkis er broytti fronturin og lyktaskipanin. Annars hevur bilurin ein nýggjan motor við variabla ventilstýringstøknini, sum á Toyotamáli nevnist VVT-i tøkni, ið gevur motorinum størri effekt, er meiri orkusparandi og samstundis ger, at bilurin dálkar minnii.

Innan er Toyta Corolla bøttur við nýggjum sportsetrum, nýggjum búnýtislitum og evnum. Umframt hetta er biluri útgjørdur við einum smartum og funktionellum »multi-informatiónsdisplay« - eisini kent frá Yarisbilunum - har tú m. a. ítøkjuliga sært miðalbensinnýtsluna, miðalferð eins, og har tú fært stýrt útvarpstólinum.

Trygdin er sum hjá Toyota annars: Dupult airbag, síðuairbag, ABS-bremnsur við EDB (Electronic Brake force Distribution), sum er ein effektiv elektronisk stýring av býtinum av bremsievnunum millum hjólini, trygdarlás til barnastól á baksetrinum, trý-punktstrygdarselar, tokulyktir aftan, setur, ið kunnu flytast upp og niður, nakkastuðlar aftan og framman.

Sosialurin út at koyra hevur enn ikki roynt nýggja bilin frá Toyota, men tað fara vit at gera seinni. Okkum kunnugt fæst bilurin eisini - við eykakostnaði - við eini navigatiónsskipan, sum kann stýrast við »multiinformatións-displaynum«, sum er í bilinum. Skipanin kann enn bert brúkast uttanlands, men ein donsk útgáva við danskari talu og vegleiðing kemur síðst í árinum.

Í komandi útgávum hyggja vit nærri at nýggja Toyota Corolla, sum í hesum døgum verður sýndur fram hjá Reyni Service í Havn.

## Luksus VW við 12 sylindarum




MAGNUS GUNNARSSON

Endamálið við at gera ein 12 cyl. Volkswagen er at fara í beinleiðis kapping við teir stóru Mercedes bilarnar - men til ein lægri prís.

VW hevur víst áhuga sín fyri yvirklassabilum við at keypa Bentley, Rolls Royce og Bugatti.

Eisini hava teir sett fyrrverandi PR-stjóran hjá Rolls Royce í starv, sum leiðara á nýggju deildini fyri luksusbilar.

"Betri góðska, meira útgerð og lægri prísir" er loysunarorðið hjá VW hesum viðvíkjandi.

Tann 12 cyl. motorurin verður gjørdur úr tveimum V6 motorum, og verður ætlandi klárur at taka í brúk í ár.

Arbeitt verður eisini við einum W8 motori, altso ein dupultur V8 sum skal brúkast til VW Passat í 2001.

**FDM / Motor nr.1/2000**

## Kanska nýggjur Ford Scorpio




MAGNUS GUNNARSSON

Eftir at Ford hevur keypt persónbiladeildina hjá Volvo, er tað eitt ivamál, um Ford hevur brúk fyri einum nýggjum Scorpio. Tað eru tó fleiri sum hava longst eftir einum avloysara fyri Ford Granada, sum var ein "succes" tann tíð tað var.

Ætlanir eru frammi um at hava ein bil kláran í 2003. Møguliga verður tað ein Mondeo undirvognur við longdari aksulfrástøðu, ella ein bilur, bygdur yvir tann stóra Volvo S-80, har eisini verður møguleiki fyri einum stationvogni.

Við at brúka Volvo undirvognin uppfylla teir trý krøv til ætlanina. Fyri tað fyrsta: Fáa teir ein persónvogn og ein stationvogn. Fyri tað næsta: Ríkiligt av útgerð og rímiligur prísur. Fyri tað triðja: Trygdin verður á høgum støði, bæði tann aktiva og passiva. Allar hesar treytir verða uppfyltar við at brúka Volvo.

**FDM / Motor nr.1/2000**



# út at koyra

# Hyundai Accent við aircondition sum standard




*Accent fæst við tveimum motorstøddum, 1,3 ccm við 86 hk og 1,5 ccm við 90 hk. Bilurin, vit royndarkoyrdu, var ein LX við 1,3 ccm motori 4 cyl við 12 ventilum*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

MAGNUS GUNNARSSON

Av teimum koreansku bilmerkjunum sum eru komin til landið hesi seinastu árini, eru Hyundai bilarnir teir sum hava verið longst. Hyundai Motor Company varð stovnað í 1967, sum eitt dóttirfelag hjá Hyundai Business Group. Hyundai fyritøkan í Suðurkorea er vorðin ein sannur ídnaðarrisi.

Ein heilt nýggjur Hyundai Accent er komin á marknaðin. Bilurin er bøttur og vorðin størri í allar mátar. Størri uttan og meira pláss innan, motorurin kraftar meira, brennur minni og er meira ljóðleysur.

Tað sær út til, at Hyundai bilarnir eru við at broytast í útsjónd. Modellini eru farin frá teim rundu til meira skarpar og konservativar linjur. Ein royndartúrur við Hyundai Accent vísti, at alt virkar væl og er sera lætt at umgangast, gearskifti, bremsur og útsýni er gott, líkamikið hvar tú sitir í bilinum.

### Klimaanlegg sum standard

Við at seta seg inn í bilin merkist beinanvegin at hesin Accent er rúmligari enn forgangarin. Plastkvaliteturin er á hædd við tað, vit síggja í teimum japansku bilunum. Alt er, sum tað skal vera, og tú finnur seg beinanvegin væl til rættis. Bilurin er vorðin 10 cm longri, 5 cm breiðari, og aksulfrástøðan er 4 cm størri.

Alt hetta gevur meira pláss innan. Setrini stuðla væl og eru góð at sita í, eisini til at koyra long strekkir uttan at møðast. Sum einasti biliurin í hesum klassanum hevur Accent klimaanlegg (Aircondition) sum standard útgerð í øllum útgávunum.

Til okkara veðurlag er klimaanlegg sera vælegnað at halda døgg burtur frá rútunum í vátveðrið, samstundis sum hitin er passaligur.

### Væl útgjørdur bilur

Accent fæst við tveimum motorstøddum, 1,3 ccm við 86 hk og 1,5 ccm við 90 hk. Bilurin, vit royndarkoyrdu, var ein LX við 1,3 ccm motori 4 cyl við 12 ventilum. Motorurin virkar kvikur, og hevur góða kraft. Tað eru bert 4 hk á muni millum tann minna og størra motorin.

Bilarnir eru komnir við 3 og 5 hurðum í LS útgávuni, men verða eisini gjørdir sum sedan við 4 hurðum.

Hyundai Accent er ein fittligur bilur, liggur væl á vegnum, og hevur gott vegtak.

Listin yvir standard útgerð er langur, eitt nú Airbag, ABS bremsur, klimaanlegg (Aircondition), nakkastuðlarnir aftan kunnu stillast, startsperru, stereo radio og servostýring. Við hesum væl útgjørda bilinum við nógvari standardútgerð til kappingarføran prís, hevur Hyundai eitt sera gott kort á hondum.

HYUNDAI

## Hyundai Accent

Motorurin: 1,3 ccm. 4 cyl. 12V 86 hk.

| | |
|---|---|
| 0-100 km/t: | 12,5 sek. |
| Trekk: | Framman |
| Dekk: | 175/70-13 |
| Bremsur: | Skivur framman, trumlur aftan |
| **Stødd og vekt:** | |
| Longd: | 420,0 |
| Breidd: | 167,0 |
| Hædd: | 139,5 |
| Eginvekt: | 1000 kg. |
| Totalvekt: | 1550 kg |
| Viðførisrúm: | 480 litrar |
| Bensinnýtsla: | 15,6 km/l |
| Prísur: | |
| LS við 3 hurðum | 110.750,- |
| LS við 5 hurðum | 119.750,- |

**Søluumboð:**
NordbilOyggjarvegur
FO-110 Tórshavn
Telefon: 313707




